# Varðveita gýtingarstovnin oman fyri 2,5 mió. tons

*Men málið er, at gýtingarstovnurin er oman fyri 5 mió. tons, sigur Jørgen Niclasen í viðmerkingum til uppskot um avtalu um fyrisiting av várgýtandi norðhavssild*

ÓLAVUR Í BEITI

Í viðmerkingunum til uppskotið verður greitt frá, at tann 20. oktober 1999 varð semja gjørd millum strandalondini Føroyar, Ísland, Noreg, Russland og ES um eina skipan um fyrisiting av várgýtandi norðhavssildini fyri 2000.

Fyri 1996 komu tey 4 strandalondini Ísland, Føroyar, Noreg og Russland ásamt um eina heildarveiði, men ES ásetti sína egnu sildakvotu. Í desember 1996 varð ein 5-landa avtala gjørd millum strandalondini Føroyar, Ísland, Noreg, Russland og ES um fyrisiting av fiskiskapinum í 1997. Hesi somu lond gjørdu í oktober 1997 og oktober 1999 avtalu um fyrisiting av fiskiskapinum í ávikavist 1998 og 1999.

**Stovnurin vaksin**

– Í nítiárunum er stovnurin av norðhavssild vaksin nógv. Sildin er farin aftur í Norska Havið at ferðast og er komin í føroyskan og íslendskan sjógv. Tó tykist stovnurin ikki enn varandi at hava tikið upp aftur sítt gamla ferðingamynstur, tí útbreiðslan millum fiskileiðirnar hevur verið skiftandi á hvørjum ári, sigur Jørgen Niclasen.

– Grundarlagið undir ásetingini av heildarkvotuni fyri 2000 var tilmælið frá ICES um støðuna og útlitini fyri norðhavssildastovnin og ein frágreiðing, sum ein arbeiðsbólkur av fiskifrøðingum og fólki frá umsitingini hjá strandalondunum saman hava gjørt um hóskandi fyristing av norðhavssildastovninum í stutttíðar og langtíðar høpi.

– ICES metir, at sildastovnurin er væl fyri og er innan fyri lívfrøðiliga tryggar karmar. Tey seinastu tvey-trý árini er stovnurin vaksin nógv, tí teir góðu árgangirnir frá 1991 og 1992 eru komnir inn í fiskiskapin. Tilgongdin síðani hevur ikki verið eins góð, og tí er ikki møguligt at halda fram við verandi fiskiskapi, uttan at stovnurin minkar. ICES mælir til, at veiðan í 2000 ikki fer upp um 1,5 mió. tons.

**Tiltøk**

– Á fundinum í Tórshavn samdust strandalondini um, at til tess at skapa fortreytir fyri, at tilgongdin til stovnin verður varðveitt á einum hóskandi sannlíkindastøði, skal øll orka leggjast í at varðveita gýtingarstovnin oman fyri 2,5 mió. tons.

– Til tess at seta í verk henda málsetning samdust partarnir um, at frá 2001 skal veiðitrýstið verða minni enn 0.125; verandi ovasta mark er 0.15. Harumframt var semja um at taka ávís stig, treytað av hvussu gýtingarstovnurin er fyri. Málið er, at gýtingarstovnurin er oman fyri 5 mió. tons, sigur Jørgen Niclasen í viðmerkingunum.

**Býtið**

– Avtalan ásetir ikki endaliga býtið av rættindunum til norðhavssildina millum strandalondini, men partarnir eru samdir um framhaldandi at kanna ferðingarmynstrið hjá sildini og at nýta ferðingarmynstrið sum ein part í ásetingini av býtinum millum londini. ST-avtalan um ferðandi fiskastovnar verður eisini nýtt sum grundarlag fyri umsitingini av stovninum.

– Í sambandi við ásetta MLV'ið fyri 2000 samdust partarnir um at taka hóskandi stig í framtíðini til tess at tryggja, at veiðistøðið tey komandi árini verður sett í mun til eina heildarætlan fyri stovnin, og at veiðistøðið, um neyðugt, verður minkað í mun til verandi heildarveiði, sigur fiskimálaráðharrin m.a. í viðmerkingunum.

# Norðoyggjar fáa ov lítið burtur úr

*Ov fá ferðafólk gista í Norðoyggjum, og tey leggja ov lítið av pengum eftir seg. Skal ferðavinnan í Norðoyggjum mennast, er neyðugt við nýggjum átøkum, heldur nýggj kanning*

EYÐUN KLAKSTEIN

Ferðavinnan í Norðoyggjum er á einum lágum støði. Ov fá fólk gista í Norðoyggjum, og tað fæst ov lítið burtur úr hesum ferðafólkum.

Hesa niðurstøðu kemur ein kanning hjá Olgu Biskopstø, cand. comm., til.

– Vónir verða í dag settar til ferðavinnuna, at hon kann vera við til at styrkja búskapin og geva samfelagnum eitt eyka bein at standa á. Men í Norðoyggjum er hesin málsetningur ikki náddur, verður sagt í niðurstøðuni í kanningini.

Talið á gistingum talar fyri seg. Í fjør gistu bert 1400 útlendsk og 1200 føroysk ferðafólk í Norðoyggjum, og tey gistu í miðal tvær nætur. Hetta kastaði 2,7 milliónir krónur av sær.



*Kunoy*

**20 milliónir meira burtur úr**

Kanningin kom í lag eftir ein ferðavinnufund, sum varð hildin í Klaksvík í apríl mánaði 1998.

Niðurstøðan á hesum fundi var, at ein verkætlan skuldi gerast um støðuna og menningarmøguleikar hjá ferðavinnuni í Norðoyggjum. Grunnur Ferðavinnunar hevur fíggjað kanningina, sum Olga Biskopstø hevur arbeitt við síðani apríl mánaði 1999.

Í niðurstøðuni sigur Olga Biskopstø, at møguleikar eru fyri at menna ferðavinnuna í Norðoyggjum. Eini 8000 ferðafólk vitja í Norðoyggjum, men flestu teirra koma og fara sama dag, og tí leggja hesi lítið og onki eftir seg.

– Um vit gagnnýttu hetta tilfeingið betur, við at fáa øll hesi ferðafólkini at steðga 2 til 3 nætur í part, hevði tað givið um 18-20 milliónir kr. árliga.

Í Norðoyggjum eru nógv fólk, ið hava áhuga í ferðavinnuni, og hildið verður, at møguleikarnir at skipa fyri góðum ferðavørum ikki tróta. Men av tí at nógvar av bygdunum eru fámentar og nógv av fólkinum har er eldri fólk, verður neyðugt at skipa ferðavinnuna í størri vinnuligar eindir, sum hava allar Norðoyggjar sum virkisøki.

**Umstøður á altjóða støði**

Kanningin heldur, at fyri at nøkta tørvin hjá teimum ferðandi og ganga ynskjum teirra á møti, er neyðugt við vælútbúnum fólki í vinnuni innan øll starvsøki.

– Somuleiðis er neyðugt at verandi og nýggj gistingarstøð eru á einum høgum støði, og at metingarskipanir verða settar í verk til tess at hækka og halda umstøðurnar á einum altjóða støði.

– Hetta krevur væl av vágafúsum íløgupeningi, sum óivað bert størri eindir megna at fáa til vega.

Olga Biskopstø heldur, at framtíðin bjóðar Norðoyggjum av, bæði við útliti til fast samband við meginøkið við undirsjóvartunnli og einari oljuvinnu, sum bankar á dyrnar.

– Taka vit av hesum avbjóðingum, kunnu vit um 5-10 ár hava eina ferðavinnu, ið megnar at taka kappingina upp við onnur øki í Føroyum og útboðið av ferðavørum uttanlands. Umframt at hetta gagnar økisbúskapinum, gevur hetta eisini teimum fastbúgvandi í økinum nógv betri møguleikar at ferðast og uppliva egið umhvørvi og egna mentan, sigur hon í niðurstøðuni í kanningini.

**Okkurt at keypa**

At fara undir at menna Norðoyggjar til ferðavinnu, krevur stór felags tøk. Fyrst og fremst eina breiða politiska undirtøku og góða undirtøku frá vinnuni.

– Her verður lagt upp til eina ferðavinnumenningarstovu sum miðstøð. Eitt forum, sum við síni fakligu styrki, er ført fyri at seta tiltøk í verk og megnar at fáa gongd á.

Kanningin heldur, at tað kunnu ganga eini 5 ár, áðrenn rættilig úrslit kunnu síggjast, so ein miðvís og væltilrættaløgd langtíðarætlan skal til.

– Sæð út frá einum økisbúskaparligum sjónarmiði, er tað líka mikið hvør ferðamaðurin er, um hann er ungur ella eldri útlendingur ella føroyingur. Tað, sum er avgerandi er, at tað er okkurt í økinum at gjalda fyri, og at hann er sinnaður at keypa tær ferðavørur sum eru.

# Luttøka og kunning eru avgerandi

*Tveir nýggir partar av starvsfólkapolitikkinum innan almennu umsitingina eru nú settir í gildi. Dentur verður á luttøkuna hjá starvsfókunum, tá avgerðir skulu takast*

JOHN JOHANNESSEN

Teir báðir nýggju partarnir av starvsfólkapolitikkinum innan almennu umsitingina, ið nú eru settir í gildi, snúgva seg um arbeiðsumhvørvispolitikk og bygnaðarbroytingar.

Parturin um um arbeiðsumhvørvispolitikk snýr seg um sálarligu og fysisku viðurskiftini á arbeiðsplássinum, meðan parturin um bygnaðarbroytingar snýr seg um starvsfólkaluttøku, tá avgerðandi broytingar skulu fremjast á arbeiðsplássinum.

Bólkurin, ið arbeiðir við at gera almenna starvsfólkapolitikkin, sigur tað vera eyðsæð, at um starvsfólk verða kunnað og sleppa at taka lut í avgerum, gevur hetta betri úrslit, tá leiðslur broyta upp á umstøðurnar og gera ymiskar tillagingar.

Bólkurin vísir á, at serliga á privata arbeiðsmarknaðinum verður tað sett sum eitt av fremstu krøvunum at hava liðiligar arbeiðsumstøður og skjótt kunna tillaga viðurskiftini, til tess at náa sett mál.

Í sambandi við partin um bygnaðarbroytingar sigur arbeiðsbólkurin, at hann framhaldandi arbeiðir við at orða ymsu partarnar av starvsfólkapoltikkinum. í løtuni verður arbeitt við rúsevnapolitikki, roykipolitikki, eldrapolitikki og familjupolitikki.

Eisini verður arbeitt við at gera reglur fyri umsjón við starvsfólkapolitikkinum. Arbeiðsbólkurin sigur í hesum sama sambandi, at ælanin er at fara undir at fremja umsjón við starvsfólkapolitikkinum seinni í ár.

Almenni starvsfólkapolitikkurin er sendur stovnum í fyrisitingini og yrkisfeløgum.

Yngd

Nr. 10 2000 SOSIALURIN




síða 13
Girl Power

síða 14 og 15
Elektriskir stoytir og refleksbjargingar

síða 16
Robbie Williams bjóðar av

baksíðan
fløguumæli